## Aftur ein pakki í februar



Sama dag sum norski fíggjarmálaráðharrin, Kristin Halvorsen, um vikuskiftið kunngjørdi, at stjórnin hevði samtykt at brúka 20 milliardir krónur til at tálma avleiðingunum av fíggjarkreppuni, segði hon, at stjórnin kemur við einum pakka afturat longu tann 9. februar. Tá verður talan um ein pakka, sum skal geva bankunum betri møguleikarnar at veita vinnulívinum og tí einstaka húsarhaldinum lán. Kristin Halvorsen segði, at úrslitið hjá teimum norsku bankunum tríggjar teir fyrstu ársfjórðingarnar í fjør var í lagi, og at bankarnir høvdu mist lítið.

## Leggja ikki í leiðarastørv

Ein kanning í Danmark bendir týðiliga á, at um nøkur fá ár verður trot á leiðarum í tí privata vinnulívinum. Tað er fakfelagið C3, sum hevur gjørt kanningina. Kanningin staðfestir, at fyri trimum árum síðani høvdu 39 prosent av teimum ungu ongan áhuga í einum leiðarastarvi, men at hein parturin nú er vorðin heili 61 prosent. Anders Drejer, professari, sigur, at tey 25-35 ára gomlu minnast, at teirra foreldur fingu ikki arbeiði og frítíð at passa saman, og at tey vilja ikki koma í somu støðu.

# sindur lættari



rokna við, at viðkomandi reagerar? Hvussu kundi eg hugsað mær, at tað bleiv sagt við meg? Hvat er tað ringasta, sum kann henda?

### Uppsøgnin

Um orsøkin til eina uppsøgn er eitthvørt, sum viðkomandi kundi bøtt um, til dømis rúsdrekkamisnýtsla, vánalig arbeiðsavrik ella atburður, so eigur viðkomandi at hava fingið eina ella tvær ávaringar, áðrenn farið verður til uppsøgn.

- Hóast tað altíð er ein stórur smeitur at verða sagdur úr starvi, koma fólk yvir tað við tíðini. Men, er mátin óheppin, so minnast tey tað restina av lívinum, sigur Bergtóra H. Joensen.

Tí skulu karmarnir ikki leggja upp til hugna ella smalltalk, eins og við øðrum truplum samrøðum, tí tað er at lumpa fólk. Eisini skal samrøðan sjálvandi fara fram fyrst í vikuni, og ikki beint upp undir vikuskifti ella feriu.

- Tá tú skalt siga fólki úr starvi, snýr tað seg um at fáa tað sagt. Og síðani at tryggja tær, at viðkomandi hevur skilt boðini. Síðani skalt tú verða fyrireikað/ur upp á, at fólk reagera ymiskt, og at tað er í lagi. Summi verða óð, onnur kedd, meðan onnur kanska siga púrt onki. Her eigur leiðaranum at lata fólk reagera, uttan sjálv/ur at fara í verjustøðu, gráta ella at blíva óð/ur, sigur Bergtóra H. Joensen.

Hon leggur afturat, at fólk hoyra ofta onki, tá tey hava skilt, at tey eru uppsøgd. Tí skal leiðarin verða til reiðar at práta við viðkomandi aftur, til dømis dagin eftir, har pláss er fyri spurningum, og at fáa tað praktiska upp á pláss.

### Finna loysnir í felag

Hitt slagið av truplum samrøðum, sum Bergtóra H. Joensen vísir til, eru tær, har endamálið er at loysa upp fyri og at finna loysnir á trupulleikum. Her eru eisini nøkur praktisk viðurskifti, sum ein eigur at minnast.

Til dømis, at tú tryggjar tær, at tit verða ikki avbrotin, hvørki av fólki, telefonum ella mailum, sum poppa inn á telduna.

– Fyrst og fremst skulu tit hava góða tíð. Og so skalt tú vera nærverandi, opin, lurtandi og hava eygnasamband. Set opnar, gjarna hv.. spurningar, og lurta væl eftir svarinum. Ofta koma fólk sjálvi við einari loysn, og tað er altíð betri, enn at onnur áleggja teimum eitthvørt. Her eru pausurnar gull verdar, tí har koma ofta tey avgerandi úttalilsini, greiðir Bergtóra H. Joensen frá.

> **Góðir spurningar**
>
> **Hvat hugsar tú um tað, eg havi sagt?**
> **Sig mær eitt sindur meir um ...**
> **Hvørjum hevur tú tørv á?**
> **Hvørjar eru tínar upplivingar?**
> **Hvat meinar tú, tá tú sigur ... ?**

### Mennandi ósemjur

Har menniskju eru, eru eisini ósemjur. Verða tær tiknar í góðari tíð og í rætta andanum, eru tær mennandi, men tær kunnu eisini skjótt blíva drepandi fyri umhvørvi, til dømis á einum arbeiðsplássi.

Men tað kundi til dømis eisini verið í einari familju, millum vinfólk ella í einum grannalagi.

- Eru allir partar til reiðar at finna eina loysn, og vanir við at sleppa til orðanna, koma vit ikki út, har vit ikki grynna. Tí er umráðandi, at vit siga okkara meiningar beinleiðis, og gera okkara tørv púra greiðan, uttan at lasta okkum sjálvi ella onnur, sigur Bergtóra H. Joensen.

Her vísir hon á tvær óhepnar typur, sum hava ilt við at siga til og frá, og sum tí eru í vanda fyri at blíva offur.

– Vit kenna øll Doris Duramáttu, sum altíð lagar seg til onnur og ongantíð sigur frá. Og so hesi, sum ongantíð koma til sakina, tí tey balla alt inn, so boðskapurin hvørvur. Hetta er alt annað enn gevandi fyri eitt samstarv, har øll skulu trívast.

### Pluss gevur pláss fyri minus

Hetta við trivnaði er eitt sum gongur aftur í prátinum við Bergtóru H. Joensen. Í hennara hugaheimi er tað ein sjálvfylgja, at arbeiðspláss hava ein greiðan og implementeraðan starvsfólkapolitikk.

- Trupla samrøðan verður nógv lættari, um gerandisdagurin er eyðkendur av opinleika, góðum anda, venjing, sparring og uppbyggjandi feed back. Tá hevur tú longu so nógv pluss á kontoini, at tað er eisini er pláss fyri minus. Og so skulu vit ikki gloyma at rósa hvørjum øðrum, tá tað er natúrligt. Sum høvundin Oddfríður M. Rasmussen einaferð segði: Besta kenningin er viðurkenningin. Hetta skulu vit eisini hava í huga, tá vit hava við starvsfólk at gera.

Boðskapurin hjá HR-mennaranum er greiður: Vit skulu heldur taka truplu samrøðuna í dag enn í morgin, og tá tú hevur roynt tað nakrar ferðir, verður tað nógv lættari.

– Men tað krevur, at tú veruliga hevur eitt ynski um, at fólk skulu trívast, og at tú ikki ræðast ósemjurnar. Tí er tað viðhvørt neyðugt at taka um sjálva rótina, fyri at finna eina loysn. Og sjálvandi áðrenn talan verður um irritatiónir ella beinleiðis uppsøgn.

## KONFLIKT-TRAPPAN

*Har menniskju eru, eru eisini ósemjur. Verða tær tiknar í góðari tíð og í rætta andanum, eru tær mennandi. Men tær kunnu eisini skjótt blíva drepandi fyri umhvørvið, til dømis á einum arbeiðsplássi*

